Nr. 117/2019

Brandur Sandoy
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um føroyskar borgarar, sum ikki sleppa heim vegna Koronafarsóttina, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógvar føroyskar borgarar veit Uttanríkis- og mentamálaráðið um, sum eru strandaðir uttanlands vegna Koronafarsóttina?

2. Hvat ger Uttanríkis- og mentamálaráðið fyri at hjálpa teimum, sum eru komin í hesa støðuna?

3. Hvussu nær er ein loysn fyri hesar borgarar, ið ikki sleppa heim til teirra kæru?

4. Hevur landsstýrið umrøtt alternativar møguleikar hjá hesum borgarum at sleppa heim til Føroya?

Viðmerkingar:
Í miðlunum frættist javnan frá føroyingum uttanlands, ið ikki sleppa heim til Føroya orsakað av, at viðurskiftini at sleppa inn til Danmarkar eru sera ógreið nú Koronafarsóttin herjar. Hetta er á ongan hátt nøktandi, og tykist tað sum trupulleikin liggur hjá donskum myndugleikum. Føroyar hava eins og Danmark alment staðiliga heitt á allar landsmenn okkara um at koma til Føroya undan farsóttini. Tí tykist tað løgið, at vit ikki gera meiri fyri at hjálpa hesum fólkum, nú tey allíkavæl ikki sleppa heim til Føroya at verða saman við síni familju og næstringum. Bíðitíðin og óvissan er ótolandi, og tí verður landsstýrismaðurin spurdur um landsstýrið hevur umrøtt møguleikan alternativt at brúka flogfelag landsins at heinta hesar borgarar okkara, ið eru strandaðir í ósjálvbodnari útlegd.

Á Løgtingi, 23. juni 2020

Brandur Sandoy